# – Tað var ræðuligt at bíða við heimsins bestu útgerð

**– Føroyska tyrlan er ein tann best útgjørda í øllum heiminum til júst slíka bjarging, sum tá Jøkulfell sakk, og tí var tað ræðuligt fyri flogskipararnar at sita og bíða í Vágum uttan at sleppa upp í bjargingina, sigur Hans Erik Jakobsen, tyrluskipari hjá Atlantsflogi**

VANLUKKA

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Tað er ein sera stór og krevjandi uppgáva at fara út at bjarga neyðstøddum í ringum veðrið, og hóast flogskipararnir høvdu gjørt seg til reiðar og høvdu fyrireikað seg mentalt, vóru teir noyddir at bíða í tveir tímar. Tað var tað ringasta, sum kundi henda, sigur Hans Erik Jacobsen, flogskipari*

– Hatta var tað ringasta, sum kundi henda.

Soleiðis sigur tyrluskiparin Hans Erik Jakobsen um støðuna, tá ið tyrlumanningin hjá Atlantsflogi noyddist at bíða í meira enn tveir tímar, áðrenn teir sluppu upp í bjargingararbeiðið, tá ið farmaskipið Jøkulfell sakk í føroyskum sjógvi.

Føroyska sjóbjargingartyrlan hevur ein sentralan leiklut í tilbúgvingini fyri føroyska sjóøkið, og døgnið runt alt árið eru fólk á vakt, sum eru til reiðar at fara at hjálpa í neyðstøðu.

Men tá ið Jøkulfell sakk norðan fyri Føroyar fyri einum lítlum mánaði síðani var føroyska tyrlan biðin um at halda seg klára, men ikki fara avstað at hjálpa fyrr enn nærri boð komu.

Hesi boðini komu meira enn tveir tímar seinni.

### Ræðuligt at bíða

Hevði føroyska tyrlan farið á flog, tá ið hon var til reiðar, kundi hon verið næstan hálvan annan tíma fyrri frammi á vanlukkustaðnum enn danska sjóverjutyrlan.

– Tað var ræðuligt fyri flogskipararnar at sita og bíða í tveir tímar og ikki føla seg verða tiknar við í bjargingararbeiðið, sigur Hans Erik Jakobsen, tyrluskipari hjá Atlantsflogi og leiðari fyri tyrludeildina.

Hann var ikki til arbeiðis sjálvur hetta vanlukkukvøldið, men hann var kunnaður um støðuna allatíðina.

– Tað er ein sera stór og krevjandi uppgáva at fara út at bjarga neyðstøddum í ringum veðrið, og hóast flogskipararnir høvdu gjørt seg til reiðar og høvdu fyrireikað seg mentalt, vóru teir noyddir at bíða í tveir tímar. Tað var tað ringasta, sum kundi henda, sigur Hans Erik Jacobsen.

### Heimsins besta útgerð

Sjóbjargingartyrlan hjá Atlantsflogi er ein sera væl egna tyrla til bjarging. Samanborið við donsku sjóverjutyrluna, sum var fyrst á staðnum, er føroyska tyrlan størri, hon kann taka fleiri fólk, hon hevur størri motororku, hon kann vera longri á flogi, og hon er sera væl útgjørd.

– Vit hava eina av heimsins best útgjørdu tyrlum til júst slíka bjarging, og tí er tað ein stórur trupulleiki, at tyrlan ikki varð send avstað at hjálpa beinanvegin – ikki minst tá ið vit sóu, hvussu avleiðingarnar av vanlukkuni vóru, sigur Hans Erik Jacobsen.

– Tað er eisini sálarliga tyngjandi hjá flogskiparunum, at teir, sum hava sum arbeiði at bjarga fólki, og sum høvdu heimsins bestu útgerð at brúka, ikki vórðu sendir avstað beinanvegin, men máttu sita og bíða við avmarkaðum upplýsingum um tilburðin.

Tá ið føroyska tyrlan umsíðir var send avstað, leitaði hon á vanlukkuøkinum í hálvan annan tíma, men fann ongan av manningini. Tyrlan fór síðani aftur til lands og lendi í Havn, tí tað var kavaódn. Dagin eftir fór hon so til Vágarnar og aftur út at leita, men uttan úrslit.

# Ein vegg í part

**Hóast øll listafólkini ikki sluppu við á árligu Várframsýningina, er talan kortini um eina fjølbroytta framsýning av myndum, skulpturum og fotomyndum**

MYNDLIST

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Teimum ið dáma væl føroyska myndlist eiga at seta sær seinnapartin í dag av til at fara í Listaskálan.

Í dag kl. 16 letur nevniliga upp árliga Várframsýningin, har íalt 16 listafólk við sera ymiskum stílum og ymiskum myndevnum sýna fram verk síni.

Ein dómsnevnd hevur frammanundan sitið og mett um verkini, ið komu inn til framsýningina. Íalt 25 listafólk sendu verk inn, men bara 16 teirra eru við á framsýningini, ið er sensurerað.

- Vit í dómsnevndini hava havt eitt trupult arbeiða at velja hesi 16 út. Jú, tað hevur verið sera hart, sigur Kári Svensson, formaður í Myndlistafelagnum.

Tað er Myndlistafelagið, sum skipar fyri hesi Várframsýningini. Framsýningin letur upp í dag og er opin fram til páskir.

### Dag og klokkutíð á

Ein treytin fyri at luttaka á Várframsýningini er at verkini skulu vera av nýggjari dato, og skulu ikki verða sýnd fram áður.

- Henda framsýningin skal tí virka sum inspirasjón til listafólkini, soleiðis at tey arbeiða við verkum sínum fram móti hesi framsýningini, sigur Kári Svensson, samstundis sum hann er í ferð við at hanga upp nakrar málningar í gamla salinum.

At øll verkini eru nýggj, sæst best av at flestu verkini eru eyðmerkt við árstalinum 2005. Eitt av verkunum hjá listarmanninum, Hans Paula Olsen er kortini so mikið nýtt, at ein næstan kann seta dag og klokkutíð á tað. Tað varð nevniliga fyrst liðugt í hesi vikuni!

Hann hevur nevniliga modellerað gitna málaran, Ingálv av Reyni teir seinastu 3-4 dagarnar. Í gjár bar so til at geva hesum verki eitt heiðurspláss í teirri einu pyramiduni, har møguleiki er at síggja fleiri



*– Tað hevur verið hart at velja út hesi 16 listafólkini á framsýningini, sigur Kári Svensson, formaður í Myndlistafelagnum, - her umgyrdur av tveimum verkum eftir Edvard Fuglø*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

onnur av verkunum hjá Hans Paula.

### Vegghamar á einum veggi

Tað sum hinvegin eisini ger hesa framsýningina so áhugaverda er, at hon inniheldur somuleiðis 10 akvarellir eftir áðurnevnda Ingálv av Reyni.

Hann er í dag 84 ára gamal, men hevur enn einaferð víst, at handalagnum og inspirasjónini við penslinum bila einki. Hesar 10 myndirnar, sum allar eru málaðar í ár, hanga væl fyri á einum veggi fyri seg.

Á einum øðrum veggi hanga fleiri myndir eftir Arnhold Vegghamar av Viðareiði somuleiðis væl fyri. Og hetta hevur júst verið eitt av hugskotunum í ár at skapa luft í framsýningina, soleiðis at væl av plássi er millum myndirnar.

Áhugavert er eisini at síggja, at klaksvíkingurin, Edvard Fuglø er við á Várframsýningini á fyrsta sinni.

### Frakkar í garderobuni

Tá 16 listarfólk soleiðis skulu vísa fram síni verk, so krevst sjálvandi nógv pláss. Og tað plássið finst í Listaskálanum, har ein somuleiðis hevur spjatt verkini runt til ein stóran part av bygninginum.

Kári Svensson er serliga fegin um, at fleiri skulpturar eru við á framsýningini, soleiðis at ein eisini fær gjørt nyttu av tí stóra gólvplássinum í Listaskálanum.

Júst hetta fær ein eisini gjørt enn betri - fyri ikki at siga fulla! - nyttu av við málningunum hjá Sigrun Niclasen av Eiði. Á framsýningini hevur hon m.a. hevur tríggjar málningar í eini røð, sum hon kallar "Frakkar".

Og rætt gitt – hesir hanga úti í garderobuni!